# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Charles Hauritz**, vanliga nevndur Sallaba, ættaður av Tvøroyri, búsitandi í Esbjerg, andaðist leygardagin 31. januar í Esbjerg, 84 ára gamal.

**Jústa Vang, Hvalba**, andaðist á Landssjúkrahúsinum leygardagin, 52 ára gomul. Jarðarferðin verður lýst seinni. Tey, ið vilja minnast Jústu, kunnu lata eina peningagávu á konto 166.34.55 í Eik.

**Dagurin**
**4. februar. Veronica**. Vit vita einki um hesa halgikvinnu uttan tað, sum halgisøgan sigur, at hon var ein, ið fylgdist við Jesusi, og at hon á leiðini út til Golgata turkaði sveittan av andliti hansara. Tá ið hon fekk turriklæði aftur, stóð mynd frelsarans á tí, og tað varð síðani varðveitt sum ein dýrur gripur. Hann varð róptur "vera ikon", sum merkir tann sanna myndin. Harav kemur eisini navnið á halgikvinnuni.

*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum)*

**75 ára føðingardagur**
Mikudagin 4. februar verður Hanna Isaksen, fyrrverandi formaður í Klaksvíkar Arbeiðskvinnufelag,75 ár.

**Prógv**
21. januar fekk Mirjam Reinert Olsen prógv sum stylist og make-up artist á skúlanum Art of International Training í Keypmannahavn.

**Prógv**
28. januar fekk Jeanette Højgaard Miné handað prógv sum sjúkrarøktarfrøðingur við bachelor í sygeplejeuddannelse í Keypmannahavn.

**Aðalfundurin hjá Arbeiðarafelagnum Lýsing**
verður 20. februar kl. 18.00 í pensjónistahúsinum.
Skrá sambært viðtøkum felagsins.
**Nevndin**




# Gordhan K. Rajani 75 ár

Týsdagin 3. februar fylti Gordhan Rajani, serlækni í orthopædi, 75 ár.

Gordhan er indari, hann var borin í heim í Shirkarpur í landslutinum Sindh, núverandi Pakistan, tann 3. februar 1934. Í 1947 flutti familjan frá Shirkarpur til Karachi og seinni til Bombay.

Frá 1952 til 1958 tók Gordhan læknaútbúgving á vælumtókta skúlanum Grant Medical Collage í Bombay.

Eftir at hava arbeitt í umleið eitt ár á sjúkrahúsi í Bombay, lá leiðin í 1959 til London, har hann fekk starv á skaðastovuni á Tilbury sjúkrahúsi.

Aftaná nøkur ár á ymiskum sjúkrahúsum í London, bar Gordhan eyga við eitt starv í Føroyum í einum læknatíðarriti. Ein umsókn varð beinanvegin send, og fáar dagar seinni kom eitt telegram aftur, har sagt varð at hann hevði fingið starvið.



Í 1964 fór Gordhan, uttan at vita stórvegis um Føroyar, við flogfari úr London til Glasgow og so víðari til Vágar. Hann byrjaði á sjúkrahúsinum í Havn, og var har til 1967.

Í hesum tíðarskeiði hitti hann Guðrun Simonsen av Høgabóli í Saltangará, sum starvaðist á sjúkrahúsinum. Eftir at tey vórðu gift, fluttu tey 9. juli 1967 til Rønne á Bornholm, har Gordhan hevði fingið starv sum skurðlækni.

Í 1969 gjørdist hann serlækni innan skurðviðgerð, og aftaná at hava arbeitt í nøkur ár á sjúkrahúsi í Aarhus og Holstebro, gjørdist hann í 1971 serlækni innan orthopædi.

Í september 1971 byrjaði Gordhan sum lækni á Klaksvíkar sjúkrahúsi, og røkti hann hetta starv til 1995. Saman við sjúkrahúsleiðsluni og politisku myndugleikunum í Norðoyggjum var hann í hesum tíðarskeiði við til støðugt at menna sjúkrahúsið í Klaksvík.

Guðrun og Gordhan eiga fimm børn: Kala, John, Sita, Laila og Gordon, umframt ommu- og abbabørn.

Seinastu árini hava Gordhan og Guðrun búð á Høgabóli í Saltangará.

*-red*

Logos Hope:

# Føroysk samkoma umborð




Fríggjakvøldið kl. 19.30 verður føroysk samkoma umborð á gomlu Norrønu, sum nú eitur Logos Hope, og liggur í Køge Havn.

Á hesari samkomu, sum Kristnastova í Keypmannahavn skipar fyri, verður m.a. greitt frá tí ætlan, sum skipsleiðslan hevur fyri Logos Hope, tá lagt verður frá landi – væntandi seinni í hesum mánaði. Eitt nú hevur talan verið um at koma til Føroya seinni í ár. Fleiri av manningini eru eisini føroyingar, og teir fara at vera við á samkomuni fríggjakvøldið.

Stóra bókasølan verður opin bæði áðrenn og aftaná fundin. Høvi verður eisini at síggja skipið, soleiðis sum tað er innrættað ídag.

Øll eru vælkomin at vera við. Tó er best at fólk siga frá við at ringja til Kristnastovu á telefon 32551809 - ella við at senda teldupost til kristnastova@kristnastova.dk

Hetta kvøldið verður eingin fundur í Kristnastovu.